# Sløkkiliðsbilurin komin

**Nýggi bilurin hjá Miðvágs- Sandavágs Sløkkiliðið er komin. Hann verður vístur fram fyri almenningi-num í dag**

BRUNATRYGD
*Edvard Joensen*

**Sandavági:** Sløkkiliðsbilurin hjá Miðvágs og Sandavágs kommunum er komin til landið. Hann verður vístur fram seinnapartin.

Nýggi sløkkiliðsbilurin er ein framkomin Ford 550 við V8 motori og einum 260–270 hestakreftum. Hann hevur tveir tangar. Ein, sum rúmar 2.000 litrum av vatni, og ein, sum tekur 90 litrar av skúmi. Á takinum hevur hann tríbýttan stiga og lýkur annars øll krøv, sum brunalógin ásetir, greiðir Dagfinn Petersen, brandmeistari í Miðvágs-Sandavágs Sløkkiliði, frá.

Bilurin kostar 1,2 mió. kr., sum verða býttar soleiðis, at partafelagið Vágatunnilin rindar 650.000,- krónur, og kommunurnar báðar Miðvágur og Sandavágur býta hinar 550.000,- ímillum sín.

Hóast navnið og sniðið er amerikanskt, er bilurin gjørdur í Danmark. Ringe Karrosseri á Fyn hevur bygt bilin, og fólk haðani fara eisini at sýna hann fram í Sandavági hósdagin. Tann framsýningin er fyrst og fremst ætlað møguligum kundum so sum kommunum og sløkkiliðum, verður sagt úr Vágum.

Vágafólk og onnur áhugað annars, fáa seinnapartin í dag høvi at síggja bilin á havnarlagnum við Trolhúsið í Miðvági, har Miðvágs og Sandavágs kommunur skipa fyri móttøku.




*Brandbilurin var at síggja uttan fyri Kommunuhúsið í Sandavági mánadagin. Tá var hann ikki skrásettur. Hann fær nummari MS 300, sigur brandmeistarin frá*
*Mynd: Edvard Joensen*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og eystri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av landsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, sunnudagin upp í andøvsgul av landsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 5 og 9 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷7 |
| Nuuk | ÷5 |
| Qaqortoq | ÷5 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | ÷2 |
| Halifax | 0 |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 7 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | ÷1 |
| Moskva | 3 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 18 |
| Róm | – |
| Malorca | 16 |
| Athen | 9 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | 16 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 26 |
| New York | ÷1 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 25 |
| Panama | – |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 970 hPa. við Hvarvið stendur í stað og grynnist. Eitt hátrýst, 1029 hPa. yvir sunnara Norðsjógvin viknar.




Lágtrýstið í útsynning úr Írlandi fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani til Íslands stendur mestsum í stað.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 07/04 kl. 06[00]– 08/04 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 9,1°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 07/04 kl. 06[00]–08/04 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 3,7 mm

**Vika 14 – 6. apríl**

1. Centrum:
**72 - 16 - 14 - 41 - 44 - 31 - 65 - 64 - 61 - 45 - 48**

1. Ramme:
**10 - 28 - 32 - 49 - 67 - 22 - 66 - 43 - 60 - 05 - 12 - 52 - 27 - 42 - 20 - 24 - 68 - 35 - 39 - 30 - 13 - 19 - 38 - 26 - 36 - 50 - 56 - 08 - 75**

Fuld plade:
**37 - 70 - 59 - 02 - 21**

Fri spil: **__XEN**

| | | |
|---|---|---|
| Fuld plade: | 1. pr. | **377.229,- kr.** |
| 1. Ramme: | 2. pr. | **19.540,- kr.** |
| 1. Centrum: | 3. pr. | **19.540,- kr.** |
| Ramme: | 4. pr. | **2.631,- kr.** |
| Centrum: | 5. pr. | **23,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

1. apríl: Tendring
4. apríl: Mánin longst frá jørðini
10. apríl: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2003

| | Suðuroyar-/Vágafirði | | Skúvoyar-/Skopunarfirði | | Hestfirði/Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/Haraldssundi | | Kalsoyar-/Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 9. apr | 00.31 | 13.09 | — | 12.09 | — | 12.24 | 02.31 | 15.09 | 03.31 | 16.09 | 11.24 | — | 10.24 | 23.02 | 00.46 | 13.24 | 01.46 | 14.24 | 00.16 | 12.54 | 01.31 | 14.09 |
| 10. apr | 01.47 | 14.25 | 00.47 | 13.25 | 01.02 | 13.40 | 03.47 | 16.25 | 04.47 | 17.25 | 00.02 | 12.40 | 11.40 | — | 02.02 | 14.40 | 03.02 | 15.40 | 01.32 | 14.10 | 02.47 | 15.25 |
| 11. apr | 03.03 | 15.27 | 02.03 | 14.27 | 02.18 | 14.42 | 05.03 | 17.27 | 06.03 | 18.27 | 01.18 | 13.42 | 00.18 | 12.42 | 03.18 | 15.42 | 04.18 | 16.42 | 02.48 | 15.12 | 04.03 | 16.27 |
| 12. apr | 03.51 | 16.13 | 02.51 | 15.13 | 03.06 | 15.28 | 05.51 | 18.13 | 06.51 | 19.13 | 02.06 | 14.28 | 01.06 | 13.28 | 04.06 | 16.28 | 05.06 | 17.28 | 03.36 | 15.58 | 04.51 | 17.13 |

5 707265 100036 >